2008-32-188

LØGMÁLARÁÐIÐ

Móttikið

2 . SEP. 2008

Sandavágs Kommuna

Sandavágs kommuna
Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

17. september 2008
Mál: 4835-001/08-3
Tygara skriv:
Viðgjørt: PL

**Viðv. fyrispurningi um hvat ein kommuna kann loyva sær at lata stuðul til**

Víst verður til fyrispurning, dagfestur 16. juni 2008, viðvíkjandi fyrispurningi um hvat ein kommuna kann loyva sær at lata stuðul til í sambandi við, at Sandavágs kommuna hevur fingið fyrispurning frá Bláa Krossi um stuðul til bygging av nýggjum viðgerðarheimi.

Við heimild í óskrivaðu kommunufulltrúini hava kommunur í ávísan mun uttan lógarheimild sjálvstøðugt fíggjarligt ræði; tvs. at kommunurnar sjálvar gera av, hvussu peningur kommununar verður nýttur. Henda heimild er tó ikki óavmarkað.

Ein kommuna kann vanliga stuðla tiltøkum, ið verða sett í verk av øðrum, um kommunan sjálv hevði kunnað átikið sær uppgávuna ella beinleiðis sett tiltakið í verk til frama fyri borgararnar í kommununi. Í ítøkiliga førinum er talan um, at Blái Krossur søkir kommunur í Føroyum um fíggjarligan stuðul í sambandi við, at bygt verður nýtt viðgerðarheim. Talan er sostatt ikki um eitt tiltak, ið kommunan sjálv setur í verk, og spurningurin er tí, um talan er uppgávu ella tiltak, ið kommunan sjálv kann átaka sær ella beinleiðis seta í verk, herundir um uppgávan er av áhuga fyri kommununa og borgarar hennara.

Grundleggjandi treytin fyri kommunalum stuðli er, at hesin er stílaður borgarunum í kommununi (sokallaða lokalitetsprincippið) og ikki grannakommununi ella einum størri landafrøðiligum øki. Í ítøkiliga førinum er talan um bygging av viðgerðarheimi í Nes kommunu, og tey, ið koma í viðgerð, koma úr øllum kommunum í landinum. Talan er sostatt ikki um slíkt tiltak, at stuðulin bert, ella í høvuðsheitum, kemur borgarunum í Sandavágs kommunu til góðar.

Tað kann tó eftir umstøðunum vera lógligt, at ein kommuna átekur sær uppgávur, ið liggja uttanfyri staðbundna økið í kommununi og harvið eisini koma borgarum úr øðrum kommunum til góðar. Avgerandi í tílíkum føri er, um uppgávan er av serligum áhuga fyri viðkomandi kommunu og borgarar hennara.

Løgmálaráðið metir ikki, at bygging av viðgerðarheimi sum Blákross fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar er ein uppgáva, ið ein kommuna sjálv hevði kunnað átikið sær ella beinleiðis sett í verk til frama fyri borgarar sínar. Henda niðurstøða er grundað á, at stuðulin kemur ikki bert, ella í avgerandi mun, borgarunum í Sandavágs kommunu til

góðar. Í hesum føri er sostatt ikki talan um eina uppgávu av áhuga fyri kommununa og borgararnar í henni sum heild, men meira ein uppgáva, ið er av áhuga fyri alt samfelagið.

Grundað á omanfyrinevnda er Løgmálaráðið komið til ta niðurstøðu, at heimild ikki er fyri at lata fíggjarligan stuðul til bygging av nýggjum viðgerðarheimi hjá Bláa Krossi.

Vegna Løgmálaráðið

Kálmar Høgenni
deildarstjóri